LM-096/2022

30-04-2023

Tilfeingisgjald

Viðmerkingar til uppskot um tilfeingisgjald og alternativur leistur (ATU)

Árni M. Dam

Innihaldsyvirlit

UPPSKOTIÐ FRÁ LANDSSTÝRINUM (UFL) 4
4 DØMIR 4
UFL ÓEGNAÐ TIL AT RØKKA ENDAMÁLINUM 5
EITT ALTERNATIVIT UPPSKOT (ATU) 6
STUTT SØGULIGT BAKSÝNI 6
YVIRNORMALUR VINNINGUR SUM HUGTAK 7
LÓGARUPPSKOTIÐ FRÁ LANDSSTÝRINUM (UFL) Í TØLUM 8
AVREIÐINGARPRÍSIR, MEN IKKI *UMSETNINGUR* MINUS *ÚTREIÐSLUR* 8
EIN EYÐSÝNDUR SYSTEMFEILUR 8
TÁ IÐ TILFEINGISGJØLD VERÐA ÁSETT 9
ALTERNATIVT UPPSKOT (ATU) - LEISTURIN 11
1. STIG: EKVIVALENTAR 11
Útroknanin av ekvivalentum 12
Uppisjóvarrættindi í 2022 í ekvivalentar 13
Makrelekvivalentar og evnini hjá tí einstaka at gjalda tilfeingisgjald 13
2. STIG: ÚTROKNAN AV GRUNDARLAGI FYRI VEIÐIGJALDI 13
Nettogrundarlagið 13
Netto-satsur 14
..... 15
Brutto-satsur 15
3. STIG: LÆKKING OG HÆKKING AV TILFEINGISGJALDI AV BRUTTO 15
Lækking 16
Hækking 16
1 stig: Prísur millum 3-11,5 kr 16
2 stig: Prísur millum 11,5-16,5 kr 16
3 stig: Prísur millum 16,50 kr.-20 kr 17
GRAFUR 1: TILFEINGISGJALD AV BRUTTO 17
GRAFUR 2: TILFEINGISGJØLD, VERANDI GJØLD, UFL UPPSKOT OG ATU UPPSKOT 18
GRAFUR 3: OGNARAVKAST, UFL MÓTVEGIS ATU 19
GRAFUR 4: OGNARAVKAST,: UFL MÓTVEGIS ATU 20
GRAFUR 5: OGNARAVKAST, BÍLIGARI SKIP MÓTVEGIS DÝRARI SKIPUM 20
NIÐURLØGA 22
ÍSKOYTIÐ 1 – SIMULERINGAR 24
ÚTROKNING FYRI HUGSAÐ DØMI, SUM ER BRÚKT SUM ÚTGANGSSTØÐIÐ FYRI ÚTROKNINGUNUM 24
ÚTROKNING FYRI SKIP 15, ÚR TALVA 1 25
ÚTROKNING FYRI SKIP 9, ÚR TALVA 1 26
ÚTROKNING FYRI SKIP 1, ÚR TALVA 1 27
ÚTROKNING FYRI SKIP 1, ÚR TALVA 1, VIÐ EINUM MIÐALPRÍSI Á 20,- KR. 27
MUNUR MILLUM UPPSKOTINI Í KR. – UPPSJÓVARVEIÐA Í 2022 29

ÍSKOYTIÐ 2 – FRÁDRÁTTIR TIL AT FINNA NETTO 31
HÝRA UPPSJÓVARSKIPUM > ENN 1.500 HK 31
FRÁVIK AV AKTUELLUM SÁTTMÁLA 31
OLJA 31
LÁN/VIRÐI Á SKIPIÐ OG EGINPENINGUR 31
BROYTING Í ØÐRUM KOSTNAÐUM 32
AVSKRIVING 32

Uppskotið frá landsstýrinum (UFL)

Í viðmerkingunum til uppskotið um veiðugjøld, sum liggur í løgtinginum, verður sagt soleiðis um orsakir til uppskotið:

> *Samgongan hevur sett sær fyri, at tilfeingisgjøldini í uppsjóvarvinnuni og flotanum í Barents-havinum verða endurskoðað, soleiðis at ein munandi, men rímiligur partur av tí serstaka vinninginum – tilfeingisrentuni – sum vinnulig serrættindi kunnu hava við sær, falla til landið.*

17 føroysk fiskifør veiddu tøku føroysku uppisjóvarkvoturnar í 2022. Kvoturnar hjá einstøku skipunum vóru ymiskar í nøgd og í samanseting av fiskasløgum. Í hesum skrivi eru skipini ikki nevnd við navni, men bert sum *skip 1, skip 2 osfr.* Eitt yvirlit vísir, at *skip 1* við størstu rættindunum veiddi 51.677 tons, meðan *skip 17* við minstu rættindunum veiddi 8.143 tons.

Verða konsekvensútrokningar gjørdar av UFL, so vísa hesar, at okkurt sum líknar einum systemfeili er innbygt í uppskotið. Uppskotið diskriminerar aktørar og letur lutvíst stór avlop í krónum liggja eftir hjá feløgum við størstu og mest virðismiklu rættindinum. Við hesum minkar eisini lutvísi parturin hjá landinum, so hvørt sum umsetningurin hjá feløgum økist.

4 dømir

Tey 4 dømini niðanfyri, sum øll eru útroknað við í støði í UFL, lýsa hetta. Dømi 1 og 2 eru realistisk dømir: kvotan er 20.000 tons í báðum dømum, meðan miðalprísirnir eru ymiskir.

Dømi 1

Nøgd í kg. 20.000.000		miðal	tilfeingis-	avreiðingar	tilfeingisgj.
fiskaslag	kg.	prísur	gjald í %	virðið	ialt
Makrelur	2.000.000	7,33	23,0%	14.660.000	3.371.800
Sild	2.000.000	5,36	19,0%	10.720.000	2.036.800
Svartkj.	16.000.000	2,16	17,0%	34.560.000	5.875.200
Ialt	20.000.000	3,00		59.940.000	11.283.800
Úrslit eftir tilfeingisgjald					48.656.200
Úrslit pr. kg. Eftir tilfeingisgjald					**2,43**

Dømi 2

Nøgd í kg. 20.000.000		miðal	tilfeingis-	avreiðingar	tilfeingisgj.
fiskaslag	kg.	prísur	gjald í %	virðið	ialt
Makrelur	8.000.000	7,33	23,0%	58.640.000	13.487.200
Sild	8.000.000	5,36	19,0%	42.880.000	8.147.200
Svartkj.	4.000.000	2,16	17,0%	8.640.000	1.468.800
Ialt	20.000.000	5,51		110.160.000	23.103.200
Úrslit eftir tilfeingisgjald					87.056.800
Úrslit pr. kg. Eftir tilfeingisgjald					**4,35**

Svartkjaftur hevur ein lutfalsligan lágan prís, men er eisini ein lutfalsliga dýrur fiskur at veiða pr. kg samanborið við makrel, sild og lodna. Hesum tekur uppskotið ikki hædd fyri. Hinvegin so verða 38,4 milliónir í *meir*avlopi eftir at tilfeingisgjald er tikið inn (87 minus 48,5 mió. kr.) ikki roknaðar sum yvirnormalur vinningur.

Niðanfyri eru tvey *hugsað* dømir, har tonsatalið hjá *skipi 1* (51.677 tons) verður brúkt sum grundarlag, men við fiktivum miðalprísum. Hesi dømi lýsa enn betur tað, sum líknar einum systemfeili í fyriliggjandi lógaruppskoti.

hugsað dømi 1					
Skip 1	**2022 kvotanøgd og tvífaldaðir 2022 miðalprísir**				
Nøgd í kg. 51.677.003		miðal	tilfeingis-	avreiðingar	tilfeingisgj.
fiskaslag	kg.	prísur	gjald í %	virðið	ialt
Makrelur	13.915.429	14,66	34,0%	204.000.189	69.360.064
Sild	8.142.110	10,72	30,0%	87.283.419	26.185.026
Svartkj.	29.619.464	4,32	24,0%	127.956.084	30.709.460
Ialt	51.677.003	8,11		419.239.693	126.254.550
Úrslit eftir tilfeingisgjald					292.985.142
Úrslit pr. kg. Eftir tilfeingisgjald					**5,67**

hugsað dømi 2					
Skip 17	**2022 kvotanøgd og miðalprísir á 20,- kr.**				
Nøgd í kg. 51.677.003		miðal	tilfeingis-	avreiðingar	tilfeingisgj.
fiskaslag	kg.	prísur	gjald í %	virðið	ialt
Makrelur	13.915.429	20,0	34,0%	278.308.580	94.624.917
Sild	8.142.110	20,0	34,0%	162.842.200	55.366.348
Svartkj.	29.619.464	20,0	24,0%	592.389.280	142.173.427
Ialt	51.677.003	20,0		1.033.540.060	292.164.692
Úrslit eftir tilfeingisgjald					741.375.368
Úrslit pr. kg. Eftir tilfeingisgjald					**14,35**

UFL óegnað til at røkka endamálinum

Um endamálið við uppskotinum er at taka inn ein rímiligan part av vinningi, so vísa dømini omanfyri, at uppskotið er óegnað.

Í roknskaparhøpi er vinningur = *umsetningur* minus *útreiðslur*. Yvirnormalur vinningur er ikki allýstur í lógaruppskotinum, og grundleggjandi roknskaparligar mannagongdir fyri at staðfesta vinning eru ikki partur av uppskotinum.

Sum dømini omanfyri eisini vísa, so leggur uppskotið upp til, at tess størri avlopið hjá einum rættindahava er, tess lutfalsliga størri partur av avlopinum liggur eftir hjá felagnum og harvið liggur tilsvarandi minni eftir hjá landinum.

Fyriliggjandi uppskot tekur ikki hædd fyri at:

- *einki samsvar yvirhøvur er millum øðrumegin hækkan og lækkan í miðalprísum og avleiddum umsetningi og hinumegin tað, sum vinningur tilsvarandi hækkar og lækkar*
- *ein lutfalsliga lítil rættindahavi hevur ein hægri eindarkostnað (kostnaður at veiða 1 kg) enn ein lutfalsliga stórur rættindahavi*
- *ein rættindahavi við lutfalsliga stórum svartkjaftarættindum og minni makrel-, silda- og lodnurættindum hevur størri útreiðslur í mun til umsetning og harvið minni vinning enn ein rættindahavi við lutfalsliga smáum svartkjaftarættindum*
- *rættindahavar sum góðska veiðina umborð hava lutfalsliga størri variablar útreiðslur enn rættindahavar, sum landa veiðina til góðskingar til virkir á landi*
- *góðsking av tilfeingi til havs verður – umvegis hægri avreiðingarprís – áløgd tilfeingisgjald, meðan virkir á landi ikki gjalda fyri víðarigóðsking*

Eitt alternativit uppskot (ATU)

Tað er ikki ætlanin við uppskotinum at koma við einum boði uppá, hvat veiðigjaldið skal ella eigur at vera – *tað avgerðina eigur Løgtingið einsamælt*. Ætlanin er hinvegin at koma við einum *alternativum* uppskoti, *einum leisti*, har inntrivini raka einstøku akørarnar øðrvísi, enn uppskotið hjá landsstýrinum ger

- *Í fyrsta lagi* er endamálið við hesum uppskoti í simplum formi at rokna út vinning hjá aktørum við støði í viðurkendum mannagongdum har: *umsetningur* minus *útreiðslur = vinningur*. Útgangsstøðið er, at samsvar skal vera millum avlop og veiðigjald
- *Í øðrum lagi* er endamálið við støði í vinningi (stórur ella lítil) at *áseta ein frymil* fyri eitt veiðigjald, har lutfalsliga lítil vinningur hevur við sær eitt lutfalsliga lægri veiðigjald og umvent, at ein lutfalsliga stórur vinningur hevur við sær eitt lutfalsliga hægri veiðigjald
- *Í triða lagi* er endamálið at skipa so fyri, at reglur fyri *útroknan* av veiðigjaldi verður ásett í lóg, meðan veiðigjaldið *í tølum* verður ásett í kunngerð. Við hesum slepst undan at broyta lógina hvørja ferð fyritreytir, so sum sveiggj í nøgdum, avreiðingarprísum, oljuprísum, rentum o.a., tala fyri, at tilfeingisgjaldið skal broytast.

Nøgdirnar í tosnsum í døminum niðanfyri eru tær somu sum í døminum omanfyri (skip 1). Talvan vísir hvussu øðrvísi tølini høvdu verið, um leisturin í alternativa uppskotinum varð brúktur.

hugsað dømi 1					
Skip 1	**2022 kvotanøgd og tvífaldaðir 2022 miðalprísir**				
Nøgd í kg.	51.677.003	miðal	tilfeingis-	avreiðingar	tilfeingisgj.
fiskaslag	kg.	prísur	gjald í %	virðið	ialt
Makrelur	13.915.429	14,66	63,7%	204.000.189	129.948.120
Sild	8.142.110	10,72	54,1%	87.283.419	47.220.330
Svartkj.	29.619.464	4,32	25,6%	127.956.084	32.756.758
Ialt	51.677.003	8,11		419.239.693	209.925.208
Úrslit eftir tilfeingisgjald					209.314.485
Úrslit pr. kg. Eftir tilfeingisgjald					**4,05**

hugsað dømi 2					
Skip 17	**2022 kvotanøgd og miðalprísir á 20,- kr.**				
Nøgd í kg.	51.677.003	miðal	tilfeingis-	avreiðingar	tilfeingisgj.
fiskaslag	kg.	prísur	gjald í %	virðið	ialt
Makrelur	13.915.429	20,0	71,3%	278.308.580	198.434.018
Sild	8.142.110	20,0	71,3%	162.842.200	116.106.489
Svartkj.	29.619.464	20,0	71,3%	592.389.280	422.373.557
Ialt	51.677.003	20,0		1.033.540.060	736.914.063
Úrslit eftir tilfeingisgjald					296.625.997
Úrslit pr. kg. Eftir tilfeingisgjald					**5,74**

Stutt søguligt baksýni

Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, sum føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn hjá føroysku tjóðini. *Hetta staðfesti løgtingið í lógini um vinnuligan fiskiskap frá 10. mars 1994 og somuleiðis í báðum sjófeingislógunum frá ávikavist 2018 og 2020.*

Rætturin at gagnnýta livandi fiskatilfeingið hevur verið skipaður í ymiskum formi síðani 1987, men ikki fyrr enn í 2011, *tá uml. 90-100.000 tons av nýggjum uppisjóvartilfeingi* bleiv tøkt hjá føroysku tjóðini og rætturin at gagnnýta hesi skuldi útlutast, tók løgtingið avgerð um, at eitt avgjald skuldi leggjast á *rættin at veiða*.

§ 2 í Løgtingslóg nr. 74 frá 6. juni 2011 ásetti:

> *Avgjald verður lagt á 66.450 tons av makrelkvotuni fyri 2011. Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi, ið fær rætt til at fiska av nevndu kvotu, skal rinda eitt avgjald, sum er kr. 0,25 fyri hvørt fiskað kilo, roknað í rundari vekt. Avgjaldið fer í landskassan.*

Føroyska makrelkvotan í 2011 var uppá 150.000 tons. Eftir umbýtið við onnur lond, vóru 126.450 tons eftir til føroysk skip at veiða. Lógin legði upp til, at teir persónar og feløg, sum *fingu* tillutað mest av hesum rættindum, skuldu *gjalda lutfalsliga minst*.

Síðani 2011 hevur verið stillað uppá avgjøldini, og avgjøld hava verið løgd á rættin at veiða onnur fiskasløg (sild og svartkjaft), men tað hevur verið hildið fast um leistin frá 2011, t.v.s., at eitt avgjald hevur verið lagt *á hvørt fiskað kg*.

Í lógini frá 2011 vórðu hugtøk sum *serrættindi*, *serstakur vinningur* ella *tilfeingisrenta* ikki brúkt.

Yvirnormalur vinningur sum hugtak

Serstakur ella yvirnormalur vinningur er í síni kjarnu eitt greitt og eintýtt hugtak: tað *er* tann parturin av samlaða vinninginum, sum stendst av, at einki verður goldið fyri serrættin at sleppa framat tilfeinginum.

Um atgongdin til tilfeingið hinvegin varð bjóðað út á einum gjøgnumskygdum marknaði, t.e. at øll kundu bjóða og at allar fortreytir (eisini sveiggj, ið kunnu hugsast) eru kendar, so varð (altíð) rindað fult fyri atgongdina, og tí hevði eingin yvirnormalur vinningur verið yvirhøvur.

Lógin um tilfeingisgjald er tí at samanbera við eina avtalu millum tveir partar, millum tann, ið eigur tilfeingið, og tann, sum fær *serrættin* at gagnnýta tilfeingið. Tá ein lóg um gjald fyri nýtslu av serrættindum verður smíðað, so eigur Løgtingið at hava sær fyri eygað, at:

- *tá ið tað almenna velur at útluta heldur enn at selja rættin at gagnnýta fiskatilfeingið, sum er ogn hjá føroysku tjóðini, so setir myndugleikin samstundis heilt ella partvís marknaðarmekanismur í fiskivinnuni úr gildi*
- *um myndugleikin fyri ein undirprís útlutar rættin at gagnnýta ávíst fiskatilfeingi, so er talan um, at myndugleikin við útlutanini veitir aktørum ein almennan studning*
- *um myndugleikin veitir pørtum av fiskivinnuni almennan studning, so er talan um, at myndugleikin samstundis fremur kappingaravlagan í fiskivinnuni*

ES, men eisini flestu lond uttanfyri ES, sum Føroyar vanliga samanbera seg við, hava reglur um *almennan stuðul*, reglur um *kappingaravlagan* og reglur um *krossstuðul*.

- *um ´yvirnormalur vinningur‘, sum stendst av, at tað almenna fyri ein undirprís útlutar ávísum aktørum rætt, at veiða uppisjóvarfisk, frítt kann nýtast í kapping í øðrum pørtum av føroyskari fiskivinnu ella í øðrum vinnugeirum, so er talan um, at almennur stuðul, veittur í einum geira, verður brúktur í kapping í øðrum geirum í føroyskum vinnulívi* (krossstuðul)

Tað kann ikki vera uppgávan hjá einum parlamenti við lóg at undirgrava kapping og kappingarføri í egnum landi. Endamálið við at taka inn serligan vinning, sum stendst av serrættindum, sum mynd-ugleikin útlutar, má vera, at yvirnormali vinningurin av at gagnnýta hetta tilfeingið fellur til eigaran, og *harvið* eisini forða fyri:

- *at partur av yvirnormala vinninginum verður verandi í vinnuni, sum óætlaður almennur stuðul*
- *at feløg í tilfeingisvinnuni við almennum stuðli gerast so kapitalráðandi, at tey harvið avlaga alla kapping á føroyska marknaðinum, herundir kappingina um kapital og arbeiðsmegi*

Lógaruppskotið frá Landsstýrinum (UFL) í tølum

Avreiðingarprísir, men ikki *umsetningur* minus *útreiðslur*

Um samlaðu uppisjóvarkvoturnar í 2023 verða tær som í 2022, og so verður veiðigjaldið í 2023 sum víst niðanfyri:

Fiskasløg	veiða kg. 2022	miðalpr. 2022	Avreiðingar-virði í kr.	tilfeingis-gjald í %	tilfeingisgjal íalt	eftir í vinnuni
Makrelur	129.812.257	7,33	951.523.844	23%	218.850.484	732.673.360
Sild	124.525.353	5,36	667.455.892	19%	126.816.619	540.639.273
Lodna	32.000.580	5,43	173.763.149	19%	33.014.998	140.748.151
Svartkj.	221.734.389	2,16	478.946.280	17%	81.420.868	397.525.413
Íalt	508.072.579	4,47	2.271.689.166		460.102.970	1.811.586.196

Ein eyðsýndur systemfeilur

Í roknskaparhøpi verða hugtøk so sum *útveganarkostnaður*, *framleiðslukostnaður*, *søluprísur*, *skift-isavlop*, *avskrivingar* og *vinningur* brúkt. Hesi eru øll grundleggjandi hugtøk, sum eru sína millum treytað. Í roknskaparhøpi er ikki møguligt at útrokna vinning bert við at kenna *útsøluprís* og *um-setning*, men ikki *útveganarkostnað* og *variablar* útreiðslur.

Trupulleikarnir við fyriliggjandi uppskoti eru fleiri, men mest grundleggjandi feilurin er, at vanligu hugtøkini, sum vit kenna frá roknskaparhøpi, antin ikki brúkt ella brúkt í skeivum samanhangi, tá yvirnormalur vinningur verður ásettur.

Tað verður ført fram, at veiðigjaldið avspeglar tann partin av vinninginum í vinnuni, sum landið – eigarin av tilfeinginum – við rímiligheit kann taka inn fyri útlutaða rættin at gagnnýta tilfeingið.

Dømini í byrjanum av hesum skrivi avdúka hinvegin, at einki samanfall er millum endamálið við lógaruppskotinum, og tey inntriv, sum lógaruppskotið fremur – tvørturímóti. Um samlaðu uppisjóvarkvoturnar í 2023 vórðu tær somu sum í 2022, men at allir prísir í 2022 vóru 50 % hægri so hevði umsetningur, tilfeingisgjald og "eftir hjá vinnuni" verið sum víst niðanfyri:

Fiskasløg	veiða kg. 2022	miðalpr. í 2022+50%	Avreiðingar-virði í kr.	tilfeingis-gjald í %	tilfeingisgjal íalt	eftir í vinnuni
Makrelur	129.812.257	11,00	1.427.285.766	31%	442.458.587	984.827.178
Sild	124.525.353	8,04	1.001.183.838	25%	250.295.960	750.887.879
Lodna	32.000.580	8,15	260.644.724	25%	65.161.181	195.483.543
Svartkj.	221.734.389	3,24	718.419.420	23%	165.236.467	553.182.954
Íalt	508.072.579	6,71	3.407.533.748		923.152.195	2.484.381.554

Uppskotið leggur upp til, at við *sama tonsatali* sum í 2022 og við *somu útreiðslum* (olju, rentum og avskrivingum), men við einum *hækkaðum miðalprísi uppá 50%* í mun til 2022, so skulu 672 milliónir av *meir*avlopi (2,484 mia. minus 1,812 mia.) liggja eftir hjá vinnuni. Hesar eru sostatt ikki fevndar av tí, sum fyriliggjandi uppskot roknar sum yvirnormalur vinningur.

Sprurningurin er: *Hvussu grundgevur Fíggjarmálaráðið fyri, at 460 milliónir av einum umsetningi uppá 2,272 mia. og 923 milliónir av einum umsetningi uppá 3,408 mia. avspegla ein rímiligan part av einum yvirnormalum vinningi?*

Tá ið tilfeingisgjøld verða ásett

Aftur og aftur verður fært fram, at eitt tilfeingisgjald helst skal verða so einkult samansett sum gjørligt. Gamaní, men løgtingið eigur fyrst og fremst at tryggja sær, at ein lóg virkar í samsvar við endamálið við lógini, í hesum føri endamálinum um *at taka inn yvirnormala vinningin – tilfeingisrentuna – í vinnuni.*


Harnæst er umráðandi, at tilfeingisgjaldið er soleiðis samansett, at tað rakar allar aktørar so eins sum gjørligt. At viga aktørar, sum hava 5 ella 10.000 tons, á somu vágskál sum teir, ið hava 50-60.000 tons at veiða, stillar aktørar óneyðugt ymiskt.


Tað kann vera trupult at raka rætt, men um tilfeingisgjaldið var ásett við støði *nettoúrsliti,* so vóru tað teir við mest virðismiklu kvotunum, sum høvdu goldið mest í kr. og lutfallsliga mest av umsetningi, eisini tí hesir høvdu kunnað brúkt aktivini (skipini) meira skynsamt enn teir við smærru kvotunum.

Dømini omanfyri vísa, at verandi lógaruppskot ikki røkkur endamálinum um, at *ein rímuligur partur av serstaka vinninginum skal falla til landið*. Dømini avdúka hinvegin eitt ósamsvar millum

endamálið við lógini og inntrivini, soleiðis sum hesi raka einstøku skipaeigarnar og púra óheft av vinningi.

Eyðsýnd og viðkomandi viðurskifti so sum skiftandi oljuprísir tekur lógaruppskotið ikki hædd fyri. Sum dømi kann vísast á, at frá fyrst í 2007 til juli í 2008 fór WTI-oljan úr 35$ til 148$ og niður aftur á 32$ síðst í 2009. Annað dømi er – sum grafarnir niðanfyri vísa – ávikavist sveigg í oljuprísum í 2022 og 2023 og óstøðugleikin í rentunum 2022 og 2023 (13 mánaðir):





Eitt dømi um, hvussu sveiggj í oljuprísinum í 2022 ítøkiliga ávirkaðu driftina hjá einum skipi kann vísast til, at tá forbrúkið pr. fiskidag á Svartkjaftaveiðu er 20.000 litrar so vórðu meirútreiðslurnar pr. dag til olju uml. 90.000 kr. tá prísurin var hægst í mun til tá hann var lægst.

Alt annað líka, so gevur ein meirútreiðsla uppá 90.000 kr. um dagin ein tilsvarandi minni vinning hjá einstaka felagnum. Hóast endamálið við fyriliggjandi uppskoti er at inndraga ein part av vinninginum, so tekur uppskotið hjá landsstýrinum als ikki hædd fyri størri ella minni vinningi.

Alternativt uppskot (ATU) - leisturin

Grundleggjandi tekur uppskotið støðið í at vinningur verður funnin við vanligum roknskaparligum mannagongdum (umsetning minus útreiðslur). At yvirnormalur vinningur sum ein sjálvfylgja er ein partmongd av vinningi og at størri vinningur viðførir lutfalsliga størri yvirnormalan vinning

1. stig: Ekvivalentar

Tað at arbeiða við ekvivalentum í fiskivinnuni er ikki eitt ókent fyribrigdi. Í fisivinnusamráðingum millum lond verða ymisk fiskasløg vanliga umroknað til ekvivalentar – uppisjóvarfiskasløg til botnfiskaekvivalentar og umvent. Við støði í ekvivalentum ber til at rokna út javnvirði av ymisku fiskasløgunum, sum lond *lata og fáa*.

Eitt av amboðunum í hesum uppskotinum er júst hetta, at øll uppisjóvarfiskasløgini verða umroknað til makrel-ekvivalentar. Við hesum verður funnið fram til, hvussu nógv kg av svartkjafti, sild ella lodnu skulu til fyri at javnviga við virði av einum kg av makreli.

Við hesum verða fiskasløg og rættindahavar vektaðir í mun til hvønn annan uttan mun til samanseting av rættindum – virðismikil makrelur, sild og lodna mótvegis minni virðismiklum svartkjafti.

Útroknanin av ekvivalentum

Ekvivalentar verða útroknaðir sum víst niðanfyri. Við 2022 miðalavreiðingarprísum uppá kr. 7,33 kr., 5,36, kr., 5,36 og kr. 2,16 fyri ávikavist makrel, sild, lodnu og svartkjaft, so eru ekvivalentarnir fyri einstøku fiskasløgini sum víst niðanfyri:

Makrelur	$= \frac{\text{prísur á makreli}}{\text{prísur á makreli}}$		=	ekvivalentur	Makrelur	$= \frac{7{,}33}{7{,}33}$	= 1,00
Sild	$= \frac{\text{prísur á sild}}{\text{prísur á makreli}}$		=	ekvivalentur	Sild	$= \frac{5{,}36}{7{,}33}$	= 0,73
Lodna	$= \frac{\text{prísur á lodnu}}{\text{prísur á makreli}}$		=	ekvivalentur	Lodna	$= \frac{5{,}34}{7{,}33}$	= 0,73
Svartkj.	$= \frac{\text{prísur á svartkjafti}}{\text{prísur á makreli}}$	x 0,85	=	ekvivalentur	Svartkjaftur	$= \frac{2{,}16}{7{,}33}$ x 0,85	= 0,25

Tá ið svartkjaftur hevur ein ekstra faktor uppá 0,85, so er tað tí, at svartkjaftur er lutfalsliga tann mest kostnaðarmikli at veiða. Hettar svarar til, at ekvivalenturin verður lækkaður við 15%. Við hesum javnviga virði 1.000 tons av makreli við 4.000 tons av svartkjafti.

Tað er sostatt kiloprísurin á einstøku fiskasløgunum í mun til makrel, sum avger makrelekvialentin. Í dømunum 1 og 2 niðanfyri eru samlaða tonsatalið tað sama, 20.000 tons, men samansetingin er ymisk. Hóast tonsini hava lutfallið 1:1, so eru virðini av kvotunum mált í ekvivalentum ymisk, ávikavist 7,46 og 14,84 ella eitt lutfall uppá 1:1,98.

Hetta skal skiljast soleiðis, at tey 20.000 tonsini í dømi 1 hava eitt javnvirði við 7.460 tons av makreli, meðan tey 20.000 tonsini í dømi 2 hava eitt javnvirði við 14.840 tons av makreli.

Dømi 1

Nøgd í kg.	20.000.000			
fiskaslag	**í %**	**kg.**		**ekvivalentar**
Makrelur	10,0%	2.000.000	1,00	2.000.000
Sild	10,0%	2.000.000	0,73	1.460.000
Svartkj.	80,0%	16.000.000	0,25	4.000.000
Ílalt	100,0%	20.000.000		7.460.000
	Ekvivalentar styttir til			**7,5**

Dømi 2

Nøgd í kg.	20.000.000			
fiskaslag	**í %**	**kg.**		**ekvivalentar**
Makrelur	40,0%	8.000.000	1,00	8.000.000
Sild	40,0%	8.000.000	0,73	5.840.000
Svartkj.	20,0%	4.000.000	0,25	1.000.000
Ílalt	100,0%	20.000.000		14.840.000
	Ekvivalentar styttir til			**14,8**

Uppisjóvarrættindi í 2022 í ekvivalentar

Verður samlaða nøgdin, miðalprísurin í 2022 og sína millum býtið av ymisku fiskasløgunum, sum tey 17 skipini veiddu í 2022, umroknað til makrel-ekvivalentar, so var samlaða tøka føroyska uppisjóvarkvotan uppá 297,7 ekvivalentar, svarandi til virði av 297.700 tonsum av makreli.

Sum tað framgongur av talvuni niðanfyri, so var virðið, uppgjørt í makrel-ekvivalentum, sum føroysk skip høvdu at veiða í 2022 sera ymiskt. Talvan vísir, at *skip nr.1* hevði 6,52 ferðir so virðimikil rættindi, sum *skip nr.17*.

skip 1-6	umrokn. til ekvival.	ekvival. í %	skip 7-12	umrokn. til ekvival.	ekvival. í %	skip 13-17	umrokn. til ekvival.	ekvival. í %
skip 1	27,4	9,2%	skip 7	20,3	6,8%	skip 13	12,8	4,3%
skip 2	26,9	9,0%	skip 8	18,9	6,3%	skip 14	12,0	4,0%
skip 3	25,3	8,5%	skip 9	16,2	5,4%	skip 15	11,6	3,9%
skip 4	24,8	8,3%	skip 10	14,6	4,9%	skip 16	7,9	2,6%
skip 5	24,0	8,0%	skip 11	13,8	4,6%	skip 17	4,2	1,4%
skip 6	23,5	7,9%	skip 12	13,5	4,5%	Íalt	297,7	100%

Talva 1 Uppisjóvarkvoturnar í 2022 skiftar sum ekvivalentar á tey 17 skipunum sum veiddu uppisjóvarfisk í 2022

Miðalvirðið av veiddu uppisjóvarkvotunum hjá øllum fiskiførum í 2022 var 17,5 ekvivalentar ella tað, sum svarar til 17.500 tons av makreli.

Makrelekvivalentar og evnini hjá tí einstaka at gjalda tilfeingisgjald

Makrelekvivalentarnir einsamallir siga einki um vinning (*umsetningur* minus *útreiðslur*) og harvið einki um evnini hjá einstøka rættindahavunum at gjalda eitt tilfeingisgjald. Við tvífalt so høgum prísum sum í 2022 varð umsetningurin hjá øllum skipum tvífaldaður. Samlaðu ekvivalentarnir høvdu framvegis verið 297,7 og lutfallið millum skip nr. 1 og skip nr. 17 hevði framvegis verið 6,52.

Ekvivalentarnir broytast bert, tá ið miðalprísir á ymisku fiskasløgunum broytast í mun til hvønn annan

2. stig: útroknan av grundarlagi fyri veiðigjaldi

Nettogrundarlagið

Við ekvivalentunum er lutfalsliga virðið av rættindum funnið, og tað er staðfest, at tess virðismiklari rættindini, tess størri er avlopið. Hetta er galdandi uttan mun til, um størri umsetningurin stendst

av stórri kvotum við lutfalsliga lágum miðalprísi ella av smærri kvotum við lutfalsliga hægri miðalprísi.

Hetta uppskotið hevur sum grundarlag, at útreiðslur – sum ein sjálvfylgja – eru partur av útroknингar grundarlagnum fyri ásetan av tilfeingisgjaldi. Tað fyrsta má tí vera at netto (*umsetningur* minus *útreiðslur*) *má* finnast.

Útgangspunktið fyri roknistykkinum niðanfyri eru tølini í dømi 1: 20.000 tons, 10%, 10% og 80% av ávikavist makreli, sild og svartkjafti (ekvivalentur 7,47)

Avreiðingarvirði	**59.940.000**	**Sí frágreiðing í Ískoyti 2**
- Frávik frá aktuella sáttm.	-	**- " -**
- Olja	6.250.000	**- " -**
- Renta	13.725.000	**- " -**
- Øking í øðrum kostnaðum	-	**- " -**
- Avskriving	9.615.385	**- " -**
Netto	**30.349.615**	

Hýrur eru sjálvandi ein útreiðsla í roknskapinum hjá einum og hvørjum reiðara og ávirka tí eisini samlaða roknistykkið. Men hýrur verða ikki tiknar við her, tí tað er ein útreiðsla, sum øll reiðarí hava og sum meira ella minni altíð eru ein ávísur fastur prosentpartur av umsetningi.

Frávik frá aktuellum sáttmálum er hinvegin tikin við. Her er talan um hýrusáttmálan hjá t.d. Norðborg mótvegis hýrusáttmálanum hjá Christian í Grótinum – verksmiðuskip mótvegis tangaskipum (sí ískoyti 1).

Netto-satsur

Við støði í fyritreytunum omanfyri (20.000 tons, og ekvivalenti 7,47) og eitt ótal av simuleringum verður tilfeingisgjaldið sett til 9,5 % av netto, ella til 2.883.213 kr., har prosentsatsurin hækkar og lækkar sum ekvivalentarnir hækka og lækka.

Við støði í hesum – og sum talvan niðanfyri vísir – so skuldi ein aktørur við ekvalenti 14,5 (virðið av 14.500 tonsum av makreli) goldið 13,05% av netto, meðan ein aktørur við ekvivalenti 7,47 skuldi goldið 9,5% av netto.

Styttur Equival.	% av Netto	Styttur Equival.	% av Netto	Styttur Equival.	% av Netto	Styttur Equival.	% av Netto
1,0	2,00%	**8,0**	10,15%	**15,0**	13,40%	**22,0**	18,30%
1,5	2,00%	**8,5**	10,30%	**15,5**	13,75%	**22,5**	18,65%
2,0	2,00%	**9,0**	10,45%	**16,0**	14,10%	**23,0**	19,00%
2,5	2,00%	**9,5**	10,60%	**16,5**	14,45%	**23,5**	19,35%
3,0	1,50%	**10,0**	10,75%	**17,0**	14,80%	**24,0**	19,70%
3,5	3,50%	**10,5**	10,90%	**17,5**	15,15%	**24,5**	20,05%
4,0	5,50%	**11,0**	11,05%	**18,0**	15,50%	**25,0**	20,40%
4,5	7,00%	**11,5**	11,20%	**18,5**	15,85%	**25,5**	20,75%
5,0	7,50%	**12,0**	11,35%	**19,0**	16,20%	**26,0**	21,10%
5,5	8,00%	**12,5**	11,65%	**19,5**	16,55%	**26,5**	21,45%
6,0	8,50%	**13,0**	12,00%	**20,0**	16,90%	**27,0**	21,80%
6,5	9,00%	**13,5**	12,35%	**20,5**	17,25%	**27,5**	22,15%
7,0	9,50%	**14,0**	12,70%	**21,0**	17,60%	**28,0**	22,50%
7,5	10,00%	**14,5**	13,05%	**21,5**	17,95%	**28,5**	22,85%

Talva 2 Styttur ekvivalentur og vísir % av netto

Brutto-satsur

Fyri at tilfeingisgjaldið skal verða einkult og lætt at umsita, so gevur tað meining at umrokna eitt nettogjald til eitt bruttogjald.

Nettoavlop 30.349.615

Tilfeingisgjald, sett til 9,5%* av netto 2.883.213 *sí Talva 2

$$\text{Umroknað av netto til brutto} = \frac{\text{Tilfeingisgjald av netto}}{\text{Avreiðingarvirði}} = \text{Prosent av brutto við prísi á 3. kr.}$$

$$\text{Umroknað av netto til brutto} = \frac{2.883.213}{59.940.000} = 4{,}8\% \text{ av brutto}$$

3. stig: Lækking og hækking av tilfeingisgjaldi av brutto

Við 4,8% av bruttoumsetningi við einum prísi uppá 3 kr. **er eitt tilvísingarpunkt** – "reference point" – funnið fyri víðari útroknan av veiðugjaldinum, **tá prísurin hækkar og lækkar frá 3 kr.**

Útgangspunktið er, at tá prísurin broytist við meira enn 10 oyrum frá 3 krónum, so broytist prosentsatsurin 4,8% av brutto samstundis. At 10 heldur enn 50 oyru er valt sum interval fyri broytan av prosentsatsinum, er fyri at fáa eitt neyvari grundarlag.

Lækking

Lækkingin er einføld. Fyri hvørji 10 oyru, sum prísurin lækkar frá 3 krónum, so lækkar brutto prosentsatsurin við 0,64% - dømi: (4,8% minus 0,64%) til komið er niður á 0%

Hækking

Hækkingin er ikki so beint fram. Satsurin fyri veiðugjaldið kann ikki hækka við einum *ávísum og føstum* prosentsatsi av brutto (t.d. við 0,64 %), hvørja ferð prísurin hækkar við 10 oyrum. Hetta hevði viðført, at kurvan fyri avlopið við einum ávísum prísi hevði brostið og avlopið fór at minka hereftir, hóast hækkandi prísir.

Við simileringum er funnið fram til, at tað gevur meining at skipa prísirnar í 3 stigum:

1) 3,00 kr. - 11,50 kr.
2) 11,50 kr. - 16,50 kr.
3) 16,50 kr. - 20,00 kr.

soleiðis at prosentsatsirnir fyri veiðugjaldinum broytast ymiskt í hvørjum av stigunum.

1 stig: Prísur millum 3-11,5 kr

Frá 3 kr. hækkar veiðugjaldi við 0,64% hvørja ferð prísurin hækkar við 10 oyrum. Men 0,64% stig er ein variabul, sum minkar fyri hvørja ferð prísurin hækkar við 10 oyrum og skal enda á 0,27%, tá ið prísurin hevur rokkið 11,50 kr.

Tað er eitt spenni uppá 8,50 kr. millum 3 kr. og 11,5 kr. Við 10 oyrum hvørja ferð, so er talan um 85 trin. Satsurin skal minka úr 0,65% til 0,27%, sum gevur eina samlaða broyting uppá 0,37. Einstaka broytingin av prosentsatsinum við hvørji 10 oyru er sostatt 0,37/85.

2 stig: Prísur millum 11,5-16,5 kr

Frá 11,5 kr. hækkar veiðugjaldi við 0,27%, hvørja ferð prísurin hækkar við 10 oyrum. Men 0,27% stig er ein variabul, sum minkar fyri hvørja ferð, prísurin hækkar við 10 oyrum og skal enda á 0,15%, tá ið prísurin hevur rokkið 16,50 kr.

Tað er eitt spenni uppá 5 kr. millum 11,5 kr. og 16,5 kr. Við 10 oyrum hvørja ferð, so er talan um 50 trin. Satsurin skal minka úr 0,27% til 0,15, sum gevur eina samlaða broyting uppá 0,12. Einstaka broytingin av prosentsatsinum við hvørji 10 oyru er sostatt 0,12/50.

3 stig: Prísur millum 16,50 kr.-20 kr


Frá 16,50 kr. hækkar veiðugjaldi við 0,15%, hvørja ferð prísurin hækkar við 10 oyrum. Men 0,15 % stig er ein variabul, sum minkar fyri hvørja ferð prísurin hækkar við 10 oyrum og skal enda á 0,09%, tá ið prísurin hevur rokkið 20 kr.

Tað er eitt spenni uppá 3,50 kr. millum 16,50 og 20 kr. Við 10 oyrum hvørja ferð, so er talan um 35 trin. Satsurin skal minka úr 0,15 % til 0,09%, sum gevur eina samlaða broyting uppá 0,06. Einstaka broytingin av prosentsatsinum við hvørji 10 oyru er sostatt 0,06/35.

Grafur 1: Tilfeingisgjald av brutto


Grafur 1 lýsir veiðigjaldið, soleiðis sum tað er lýst omanfyri við útgangsstøði í:

- miðalprísi uppá 3 kr pr. kg
- ekvivalenti uppá er 7,47
- veiðigjaldi av netto 9,5%
- veiðigjald av brutto 4,8%



Grafur 1 Tilfeingisgjald av brutto søluprísi við einum ekvivalenti á 7,47


Grafur 2: Tilfeingisgjøld, verandi gjøld, UFL uppskot og ATU uppskot



Grafur 2 øll tilfeingisgjøldini, galdandi tilfeingisgjald, uppskot frá landsstýrinum (UFL) og nýggja uppskoti (ATU) í hesum dokumenti

Sum tað framgongur av greiningini, so lýsir grafurin veiðigjøld soleiðis, sum tey eru nú, sum tey verða um fyriliggjandi lógaruppskot verður samtykt óbroytt og sum tað hevði verið, um ATU uppskotið var nýtt.


Grafur 3: Ognaravkast, UFL mótvegis ATU



Grafur 3 Ognaravkast, við uppskotinum hjá landsstýrinum og ATU uppskotinum

Grafur 4: Ognaravkast,: UFL mótvegis ATU

Hesin grafurin eitt kut úr grafi 3 og vísir greiðari, hvat hendir við ognaravkastinum, tá miðalprísirnir liggja millum 0 og 8,00 kr.



Grafur 4 Ognaravkast UFL mótvegis ATU uppskoti (Lýsir betri ognaravgjaldi við galdandi fiskaprísum)


Sum grafurin vísir so er ATU-ognaravkasti størri við lægru prísunum. Verður hugt at skipinum við 7,47 ekvivalentum, so ferð ATU ognaravkastið ikki niður um UFL ognaravkastið, fyrr enn prísurin fer uppá 6,30 kr. kg.

Grafur 5: Ognaravkast, bíligari skip mótvegis dýrari skipum

Útgangsstøðið er, at samsvar er millum virðið av rættindum og tað sum hesi kasta av sær. Rættinda-havar gera íløgur í skip, sum svara til rættindini og tí vilja aktørar við lutfallsliga smáum rættindum (lágum ekvivalentunum) helst eisini hava bíligari og eldri skip.

Hesin grafurin vísir ognaravkast hjá feløgum við rættindum svarandi til 4,2 og 7,47 ekvivalentar og við skipum, sum eru sett at kosta 150 mió. kr., eginpeningurin er settur til 20% av skipsvirðinum – skipini við rættindi við fleiri ekvivalentum eru sett at kosta 250 mió. kr.

Her framgongur, at ongaravkastið hjá aktørinum við ekvivalenti 7,47 og tí, sum hevur ekvivalent 16,1 fella nærum saman, samstundis sum ognaravkastið við ATU er munandi hægri hjá hesum enn tað er í uppskotinum, sum landsstýrið hevur lagt fram, tá prísirnir eru lágir.



Niðurløga

Eitt yvirskipað atlit, sum bæði løgting og umsitingarmyndugleiki *altíð* eiga at hava sær fyri eygað, er, at mest møguligt virði fæst burturúr føroyska fiskatilfeinginum.

Góðska og prísur fylgjast aloftast at, og tí eigur myndugleikin bæði at vera árvakin og umhugsin, tá ið skipanir, sum tann við veiðigjaldi verða knæsettar, og somikið meira, tá ið talan er um eina skipan, ið regulerar so stór virðir, sum skipanin við veiðigjøldum ger.

UFL leggur upp til, at allir aktørar, stórir sum smáir, verða vigaðir á somu vágskál - miðalprísi. Ein aktørur við 5.000 tonsum kann ikki gagnnýta sítt skip eins skynsamt og ein aktørur við 50.000 tonsum, og kostnaðurin at veiða 1 kg. *eru* størri hjá smærru aktørunum enn hjá størru aktørunum.

Tá ið avreiðingarprísur heldur enn avlop (*umsetningur* minus *útreiðslur*) verður brúkt sum vágskál, so verða smáir aktørar við smáum nøgdum revsaðir í mun til stórar aktørar og stórar nøgdir, óheft av góðsku og prísi.

Fiskivinnan er ein avgerandi partur av tilverugrundarlagnum í Føroyum, tí mugu vit eisini tora hava hugsanir um, hvussu ein skipan við tilfeingisgjaldi skal skipast, soleiðis at hon er til fyrimunar fyri alt tað føroyska samfelagið og ikki bert einstakar føroyingar.

Tað liggja við vissu stórar inntøkur enn og bíða eftir, at vit fara virðisøkja okkara tilfeingi uppaftur meira, enn vit gera í dag. Ein ábending, um hvat møguliga liggur á láni, sæst, um vit samanbera samlaða føroyska uppisjóvarflotan við verksmiðjutrolaran Nordborg.

Miðalprísurin fyri samlaðu føroysku uppisjóvarveiðina í 2022 var *4,41 kr.kg*. og samlaða avreiðingarvirðið fyri 476.071 tons var *2.097.926 milliónir*.

Um 2022-miðalprísirnir, sum Nordborg fekk fyri einstøku fiskasløgini, varð brúkt uppá tølini fyri samlaðu føroysku uppisjóvarveiðina í 2022, so hevði miðalprísurin verið *7,37 kr.kg* og samlaða avreiðingarvirðið hevði verið *3.509.322 milliónir*, heldur ennn 2.097.926..

Hjá Nordborg skal kapasitetur á verksmiðju og fiskiskapur ganga hond í hond –Tískil kann Nordborg mótsett tangabátum, har maskinorka og tangalastir stýra fiskiskapinum, liggja við lutvíst lítlum fiskiskapi og framleiða eina kvalitetsvøru.

Norðborg skal ikki gjalda tilfeingisgjald av egnum *høgum* miðalprísi, men av *lága* miðalprísinum hjá samlaða uppisjóvarflotanum, og í so máta fær Norðborg ein fyrimun av egnum høgum miðalprísi. Men Norðborg hevur aðrar og størri framleiðslukostnaðir við m.a. størri manskapi og einum ørðvísi hýrusáttmála enn tangabátarnir.

Spurningurin blívur tí: Er skipanin við veiðigjøldum skrúva soleiðis saman, at tað, sum loysir seg best fyri landið (høg góðska og høgir prísir), eisini loysir seg best fyri einstaka skipaeigaran? Høvdu t.d. fleiri verksmiðjuskip – 'Norðborgir' – verið betri fyri føroyska samfelagið enn fleiri tangabátar?

Einfalda samanberingin omanfyri er sjálvandi ikki so einføld, sum hon kann tykjast, tí í dag verður bert ein partur av framleiðsluni hjá Nordborg víðarigóðskað í landi, meðan tað mesta av veiðan hjá tangabátunum verður víðarigóðskað og virðisøkt á landi.

Ein útrokning sum undirritaði hevur gjørt vísir, at virðisvøksturin á landi er uml. tann sami pr. kg., sum munurin er millum miðalprísinum hjá Nordborg og tangabátunum.

Samgongan hevur sett sær fyri, at tilfeingisgjøldini í uppsjóvarvinnuni og flotanum í Barentshavinum verða endurskoðað, soleiðis at ein munandi, men rímiligur partur av tí serstaka vinninginum – tilfeingisrentuni – sum vinnulig serrættindi kunnu hava við sær, falla til landið.

Eftirsum skipanin við veiðigjøldum tekur støðu í avreiðingarprísum og ikki í øðrum viðkomandi viðurskiftum so sum vinningi, so er trupult at fáa eygað á, at rætta veiðigjaldið kann ásetast við ætlaðu lógini ella *at atlitið um, at mest møgulig virðir altíð skulu fáast burturúr føroyska fiskatilfeinginum, er hugsað inn lógina um tilfeingisgjald*

Ískoytið 1 – Simuleringar

Á næstu síðunum verður við nøkrum simuleringum víst, hvussu nýggja tilfeingisgjaldið ávirkar ymisku aktørarnar. Simuleringar eru gjørdar fyri tað hugsaða skipið niðanfyri við 7,47 ekvivalentum. Hini skipini eru *skip 15*, *skip 9* og *skip 1*.

Samanberingar verða gjørdar millum núverandi gjøld, UFL og ATU uppskotini. Prísirnir eru miðalprísir fyri 2022.

Útrokning fyri hugsað dømi, sum er brúkt sum útgangsstøðið fyri útrokningunum

	Nøgd í kg.	prísur pr. kg.	Avreiðingarvirði
Makrelur	2.000.000	7,33	14.660.000
Sild	2.000.000	5,36	10.720.000
Sv.kjaftur	16.000.000	2,16	34.560.000
Ialt	**20.000.000**	**3,00**	**59.940.000**
		- Tilfeingisgjald	6.115.755
		- Hýra	14.187.735
		- Olja	6.250.000
		- annar rakstur	17.000.000
		Úrslit áðrenn kapital	**16.386.510**
		- Renta	13.725.000
		- Avskrivingar	9.615.385
		úrslit áðrenn skatt	-6.953.874
		skattur	-
		úrslit eftir skatt	-6.953.874

Dagar til fiskiskap	100

Partar	Hýra	Dagløn
manningapartur	879.129	8.791
skipara partur	2.266.225	22.662

Ognaravkast	2,3%
Renta av eginpeningi	0,0%

	ATU tilfeingisgjald			Verðandi tilfeingisgjald			UFL tilfeingisgjald		
	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt
Ma krelur	28,3%	2,07	4.147.045	19,0%	1,39	2.785.400	23,0%	1,69	3.371.800
Sild	18,4%	0,98	1.968.710	18,5%	0,99	1.983.200	19,0%	1,02	2.036.800
Sv. jaftur	0,0%	-	0	16,0%	0,35	5.529.600	17,0%	0,37	5.875.200
Ialt			**6.115.755**			**10.298.200**			**11.283.800**

munur millum tilfeingisgjøldini					
Verðandi	10.298.200	Verðandi	10.298.200	(UFL)**	11.283.800
(UFL)**	11.283.800	(ATU)*	6.115.755	(ATU)*	6.115.755
munur	**985.600**	**munur**	**-4.182.445**	**munur**	**-5.168.045**

* (ATU) **A**l**T**ernativt **U**ppskot um tilfeingisgjald

** (UFL) **U**ppskot **F**rá **L**andsstýrinum um tilfeingisgjald

Talva 3 útrokningar við eini nøgd á 7,47 ekvivalentum

Eingin hevur eina samanseting av rættindum, har svartkjafturin er lutfallsliga so stórur partur sum, dømið omanfyri vísir. Dømi er tikið við fyri at vísa, at tað er ikki líkamikið hvussu samansetingin av rættindum er. Kostnaðurin fyri at veiða hvørt tonsið er í døminum tann sami, hóast svartkjaftur undir vanligum umstøðum er dýrari at veiða, enn makrelur og sild.

Reiðaríini við kvotum sum lýst í døminum omanfyri, hava (allarhelst) bíligari skip og tilsvarani lægri fastar útreiðslur. Eg haldi tó, at øll eiga at verða roknað við støði í somu fyritreytum.

Útrokning fyri skip 15, úr Talva 1**Fejl! Henvisningskilde ikke fundet.**

	Nøgd í kg.	prísur pr. kg.	Avreiðingarvirði
Makrelur	6.990.026	7,33	51.236.891
Sild	6.012.498	5,36	32.226.989
Sv.kjaftur	807.090	2,16	1.743.314
Ílalt	**13.809.614**	**6,17**	**85.207.194**
		- Tilfeingisgjald	22.746.393
		- Hýra	16.464.277
		- Olja	4.315.504
		- annar rakstur	17.000.000
		Úrslit áðrenn kapital	**24.681.020**
		- Renta	13.725.000
		- Avskrivingar	9.615.385
		úrslit áðrenn skatt	1.340.636
		skattur	241.314
		úrslit eftir skatt	1.099.321

Dagar til fiskiskap		69
Partar	**Hýra**	**Dagløn**
manningapartur	1.020.193	14.775
skipara partur	2.629.860	38.087
	Ognaravkast	5,0%
	Renta av eginpeningi	2,2%

	ATU tilfeingisgjald			Verðandi tilfeingisgjald			UFL tilfeingisgjald		
	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt
Makrelur	31,0%	2,28	15.905.361	19,0%	1,39	9.735.009	23,0%	1,69	11.784.485
Sild	21,1%	1,13	6.806.165	18,5%	0,99	5.961.993	19,0%	1,02	6.123.128
Sv.kjaftur	2,0%	0,04	34.866	16,0%	0,35	278.930	17,0%	0,37	296.363
Ílalt			**22.746.393**			**15.975.933**			**18.203.976**

munur millum tilfeingisgjøldini					
Verðandi	15.975.933	Verðandi	15.975.933	(UFL)**	18.203.976
(UFL)**	18.203.976	(ATU)*	22.746.393	(ATU)*	22.746.393
munur	**2.228.044**	**munur**	**6.770.460**	**munur**	**4.542.416**

* (ATU) **AlTernativt Uppskot um tilfeingisgjald**

** (UFL) **Uppskot Frá Landsstýrinum um tilfeingisgjald**

Talva 4 útrokningar við eini nøgd á 11, 6 ekvivalentum, skip 15 úr Talva 1

Útrokning fyri skip 9, úr Talva 1

	Nøgd í kg.	prísur pr. kg.	Avreiðingarvirði
Makrelur	6.104.799	7,33	44.748.177
Sild	7.587.725	5,36	40.670.206
Sv.kjaftur	17.814.947	2,16	38.480.286
Íalt	**31.507.471**	**3,93**	**123.898.668**
		- Tilfeingisgjald	26.558.011
		- Hýra	25.658.389
		- Olja	9.846.085
		- annar rakstur	17.000.000
		Úrslit áðrenn kapital	**44.836.184**
		- Renta	13.725.000
		- Avskrivingar	9.615.385
		úrslit áðrenn skatt	21.495.799
		skattur	3.869.244
		úrslit eftir skatt	17.626.555

Dagar til fiskiskap		158
Partar	**Hýra**	**Dagløn**
manningapartur	1.589.897	10.092
skipara partur	4.098.447	26.016
	Ognaravkast	11,7%
	Renta av eginpeningi	35,3%

	ATU tilfeingisgjald			Verðandi tilfeingisgjald			UFL tilfeingisgjald		
	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt
Makrelur	33,8%	2,48	15.125.461	19,0%	1,39	8.502.154	23,0%	1,69	10.292.081
Sild	23,9%	1,28	9.711.215	18,5%	0,99	7.523.988	19,0%	1,02	7.727.339
Sv.kjaftur	4,5%	0,10	1.721.335	16,0%	0,35	6.156.846	17,0%	0,37	6.541.649
Íalt			**26.558.011**			**22.182.987**			**24.561.068**

munur millum tilfeingisgjøldini					
Verðandi	22.182.987	Verðandi	22.182.987	(UFL)**	24.561.068
(UFL)**	24.561.068	(ATU)*	26.558.011	(ATU)*	26.558.011
munur	**2.378.081**	**munur**	**4.375.024**	**munur**	**1.996.943**

* (ATU) **AlT**ernativt **U**ppskot um tilfeingisgjald

** (UFL) **U**ppskot **F**rá **L**andsstýrinum um tilfeingisgjald

Talva 5 útrokningar við eini nøgd á 16,1 ekvivalentum, skip 9 úr Talva 1

Útrokning fyri skip 1, úr Talva 1

	Nøgd í kg.	prísur pr. kg.	Avreiðingarvirði
Makrelur	13.915.429	7,33	102.000.095
Sild	8.142.110	5,36	43.641.710
Sv.kjaftur	29.619.464	2,16	63.978.042
Íalt	**51.677.003**	**4,06**	**209.619.846**
		- Tilfeingisgjald	63.208.782
		- Hýra	38.593.042
		- Olja	16.149.063
		- annar rakstur	17.000.000
		Úrslit áðrenn kapital	**74.668.960**
		- Renta	13.725.000
		- Avskrivingar	9.615.385
		úrslit áðrenn skatt	51.328.575
		skattur	9.239.143
		úrslit eftir skatt	42.089.431

Dagar til fiskiskap		258
Partar	**Hýra**	**Dagløn**
manningapartur	2.391.381	9.255
skipara partur	6.164.516	23.858
	Ognaravkast	21,7%
	Renta av eginpeningi	84,2%

	ATU tilfeingisgjald			Verðandi tilfeingisgjald			UFL tilfeingisgjald		
	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt
Makrelur	41,2%	3,02	41.994.647	19,0%	1,39	19.380.018	23,0%	1,69	23.460.022
Sild	31,2%	1,67	13.637.097	18,5%	0,99	8.073.716	19,0%	1,02	8.291.925
Sv.kjaftur	11,8%	0,26	7.577.038	16,0%	0,35	10.236.487	17,0%	0,37	10.876.267
Íalt			**63.208.782**			**37.690.221**			**42.628.214**

munur millum tilfeingisgjøldini					
Verðandi	37.690.221	Verðandi	37.690.221	(UFL)**	42.628.214
(UFL)**	42.628.214	(ATU)*	63.208.782	(ATU)*	63.208.782
munur	**4.937.993**	**munur**	**25.518.561**	**munur**	**20.580.568**

* (ATU) **Al**Ternativt **U**ppskot um tilfeingisgjald

** (UFL) **U**ppskot **F**rá **L**andsstýrinum um tilfeingisgjald

Talva 6 útrokningar við eini nøgd á 27,3 ekvivalentum, skip 1 úr Talva 1

Útrokning fyri skip 1, úr Talva 1, við einum miðalprísi á 20,- kr.

Einhvør skipan sum løgtingið knæsetir eigur at verða tryggjað móti einum ávísum langtíðarhaldbari. Tí eigur skipanin við veiðigjøldum, sum eina sjálvfylgju, eisini at fevna um prísir, sum eru munandi hægri enn teir vit kenna í dag.

At roknað verður við einum prísi heilt upp til 20,- kr. er út frá tí sannroynd, at prísurin á m.a. makreli hevur verið upp ímóti 15,- kr./kg. í Norra. Eisini hevur danskt skip í fleiri umførum landað makrel í Føroyum fyri uml. 12. kr. kg.

Skip 1 í Talva 1 (ekvivalent 27,3) hevði sum víst í talvu 6 ein miðalprís á 4,06 kr. Um skip1 ístaðin fyri 4,06 kr hevði havt ein miðalprís uppá 20 kr. so hevði tilfeingisgjaldið av brutto verið 71,3%, (sí. Grafur 2), ognaravkastið 58,5%, og renta av eginpeningi 265,1%.

	Nøgd í kg.	prísur pr. kg.	Avreiðingarvirði
Makrelur	13.915.429	20,00	278.308.580
Sild	8.142.110	20,00	162.842.200
Sv.kjaftur	29.619.464	20,00	592.389.280
Ílalt	**51.677.003**	**20,00**	**1.033.540.060**
		- Tilfeingisgjald	737.313.886
		- Hýra	78.083.368
		- Olja	16.149.063
		- annar rakstur	17.000.000
		Úrslit áðrenn kapital	**184.993.743**
		- Renta	13.725.000
		- Avskrivingar	9.615.385
		úrslit áðrenn skatt	161.653.358
		skattur	29.097.604
		úrslit eftir skatt	132.555.754

Dagar til fiskiskap		258
Partar	**Hýra**	**Dagløn**
manningapartur	4.838.361	18.725
skipara partur	12.472.356	48.270
	Ognaravkast	58,5%
	Renta av eginpeningi	265,1%

	ATU tilfeingisgjald			Verðandi tilfeingisgjald			UFL tilfeingisgjald		
	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt	í %	í kr.	íalt
Makrelur	71,3%	14,27	198.541.681	21,5%	4,30	59.836.345	34,0%	6,80	94.624.917
Sild	71,3%	14,27	116.169.484	19,5%	3,90	31.754.229	34,0%	6,80	55.366.348
Sv.kjaftur	71,3%	14,27	422.602.721	17,0%	3,40	100.706.178	24,0%	4,80	142.173.427
Ílalt			**737.313.886**			**192.296.751**			**292.164.692**

munur millum tilfeingisgjøldini					
Verðandi	192.296.751	Verðandi	192.296.751	(UFL)**	292.164.692
(UFL)**	292.164.692	(ATU)*	737.313.886	(ATU)*	737.313.886
munur	**99.867.941**	**munur**	**545.017.135**	**munur**	**445.149.193**

* (ATU) **AlT**ernativt **U**ppskot um tilfeingisgjald

** (UFL) **U**ppskot **F**rá **L**andsstýrinum um tilfeingisgjald

Talva 7 útrokningar við eini nøgd á 27,3 ekvivalentum, skip 1 í Talva 1 (miðalprís á 20,- kr.)

Munur millum uppskotini í kr. – uppsjóvarveiða í 2022

Niðanfyri verða samanberingar gjørdar millum *verandi tilfeingisgjøld*, *tilfeingisgjøld, sum tey verða um uppskotið frá Fíggjarmálaráðnum verður samtykt óbroytt* og *tilfeingisgjøld um alternativa uppskotið var í nýtslu.*

Hædd er ikki tikin fyri, at ein lutfallsliga lítil partar av uppisjóvarkvotuni varð undantikin kravinum um tilfeingisgjald í 2022 (t.d. bólkur 2 og 3). Talvan niðanfyri tekur tí støði í *samlaðu* uppsjóvarveiðini í 2022.

	Ekval.	(ATU)* tilfeingisgj.	verðandi tilfeingisgj.	munur		Ekval.	(ATU)* tilfeingisgj.	verðandi tilfeingisgj.	munur
skip 1	27,4	63.208.782	37.690.221	25.518.561	**skip 10**	14,6	21.487.758	19.936.031	1.551.727
skip 2	26,9	55.938.818	32.122.152	23.816.667	**skip 11**	13,8	21.482.908	18.981.869	2.501.038
skip 3	25,3	48.441.088	29.539.754	18.901.334	**skip 12**	13,5	22.549.782	18.606.296	3.943.486
skip 4	24,8	52.289.164	34.028.663	18.260.501	**skip 13**	12,8	19.383.163	17.625.793	1.757.369
skip 5	24,0	48.097.558	25.908.342	22.189.217	**skip 14**	12,0	19.383.163	16.557.386	2.825.777
skip 6	23,5	41.555.969	26.687.988	14.867.981	**skip 15**	11,6	22.746.393	15.975.933	6.770.460
skip 7	20,3	38.820.231	22.499.466	16.320.766	**skip 16**	7,9	10.603.378	10.774.498	-171.120
skip 8	18,9	36.572.348	25.966.207	10.606.141	**skip 17**	4,2	4.806.235	5.816.690	-1.010.455
skip 9	16,2	26.558.011	22.182.987	4.375.024	**Ílalt**	**297,7**	**553.924.749**	**380.900.275**	**173.024.473**

* (ATU) **A**l**T**ernativt **U**ppskot um tilfeingisgjald

Talva 8 Øll skip sum veiddu uppsjóvarfisk í 2022, fyri galdandi tilfeingisgjal og nýggja uppskotið

	Ekval.	(UFL)** tilfeingisgj.	verðandi tilfeingisgj.	munur		Ekval.	(UFL)** tilfeingisgj.	verðandi tilfeingisgj.	munur
skip 1	27,4	42.628.214	37.690.221	4.937.993	**skip 10**	14,6	21.945.436	19.936.031	2.009.405
skip 2	26,9	40.582.874	32.122.152	8.460.722	**skip 11**	13,8	21.424.895	18.981.869	2.443.026
skip 3	25,3	37.773.281	29.539.754	8.233.527	**skip 12**	13,5	21.248.096	18.606.296	2.641.800
skip 4	24,8	37.851.369	34.028.663	3.822.706	**skip 13**	12,8	19.848.450	17.625.793	2.222.657
skip 5	24,0	36.566.347	25.908.342	10.658.006	**skip 14**	12,0	23.560.556	16.557.386	7.003.170
skip 6	23,5	35.017.131	26.687.988	8.329.143	**skip 15**	11,6	18.203.976	15.975.933	2.228.044
skip 7	20,3	30.844.194	22.499.466	8.344.728	**skip 16**	7,9	11.952.453	10.774.498	1.177.954
skip 8	18,9	29.343.276	25.966.207	3.377.069	**skip 17**	4,2	6.591.351	5.816.690	774.661
skip 9	16,2	24.561.068	22.182.987	2.378.081	**Ílalt**	**297,7**	**459.942.967**	**380.900.275**	**79.042.692**

** (UFL) **U**ppskot **F**rá **L**andsstýrinum um tilfeingisgjald

Talva 9 Øll skip sum veiddu uppsjóvarfisk í 2022, fyri galdandi tilfeingisgjal og uppskotið frá Landstýrinum

	Ekval.	(ATU)* tilfeingisgj.	(UFL)** tilfeingisgj.	munur
skip 1	27,4	63.208.782	42.628.214	20.580.568
skip 2	26,9	55.938.818	40.582.874	15.355.944
skip 3	25,3	48.441.088	37.773.281	10.667.807
skip 4	24,8	52.289.164	37.851.369	14.437.795
skip 5	24,0	48.097.558	36.566.347	11.531.211
skip 6	23,5	41.555.969	35.017.131	6.538.837
skip 7	20,3	38.820.231	30.844.194	7.976.037
skip 8	18,9	36.572.348	29.343.276	7.229.072
skip 9	16,2	26.558.011	24.561.068	1.996.943
skip 10	14,6	21.487.758	21.945.436	-457.678
skip 11	13,8	21.482.908	21.424.895	58.012
skip 12	13,5	22.549.782	21.248.096	1.301.686
skip 13	12,8	19.383.163	19.848.450	-465.287
skip 14	12,0	19.383.163	23.560.556	-4.177.393 ***
skip 15	11,6	22.746.393	18.203.976	4.542.416
skip 16	7,9	10.603.378	11.952.453	-1.349.074
skip 17	4,2	4.806.235	6.591.351	-1.785.116
Ialt	**297,7**	**553.924.749**	**459.942.967**	**93.981.782**

* (ATU) **A**l**T**ernativt **U**ppskot um tilfeingisgjald

** (UFL) **U**ppskot **F**rá **L**andsstýrinum um tilfeingisgjald

Um skip 14 og 15 verða tikin sum dømi, so hava hesi rættindi nærum sama avreiðingarvirði. Men skip 14 skal veiða knapt 11.000 tons meira ein skip 15. Útreiðslurnar hjá skipi 14 at fáa fongin til høldar verða tí tilsvarandi hægri.

*** meira oljuforbrúk:

ekvalent	**12,0**	**11,6**
	skip 14	**skip 15**
Makrelur	5.423.102	6.990.026
Sild	3.719.316	6.012.498
Svartkj.	15.383.558	807.090
kg. ialt	24.525.976	13.809.614
ein munur á munur		**10.716.362 kg.**

við eini veiðu á 400 tons um dagin hevur skip 14
27 fiskidagar meira enn skip 15
27 dagar í sigling, meira enn skip 15

Við oljuprísinum 1. jan 2022

Oljunýtsla:	**dagar**	**olja ltr.**	**á kr.**	**ialt**
fiskidagar	27	20.000	5,66	3.056.400
sigling	27	7.000	5,66	1.069.740
Meira kostna av olju, í mun til skip 15				**4.126.140 kr.**

Við oljuprísinum 28. mai 2022

Oljunýtsla:	**dagar**	**olja ltr.**	**á kr.**	**ialt**
fiskidagar	27	20.000	10,01	5.405.400
sigling	27	7.000	10,01	1.891.890
Meira kostna av olju, í mun til skip 15				**7.297.290 kr.**

Sum Talva 9 vísa, so tekur UFL 7 mió. kr. meira í veiðigjaldi frá skipi 14, enn hvat galdandi lóg um tilfeingisgjøld ger og 4,5 mio meira enn ATU vildi tikið.

Men enn meira óskiljandi, so tekur UFL 5,3 mio meira í tilfeingisgjaldi frá skipið 14 enn frá skipi 15 og hetta hóast virðið av veiðini er nærum tað sama, men at skip 14 hevur eina beinleiðis meir-útreiðslu - bert í olju - uppá millum 4 og 7 mio, fyri at fongin til høldar.

Ískoytið 2 – Frádráttir til at finna netto

Hýra uppsjóvarskipum > enn 1.500 HK

Útgangstøðið fyri útroknan av hýru í ATU er sáttmálin hjá uppsjóvarskipum > enn 1.500 HK, við eini manning á 12. Sí Talva 10

	Útgangsstøði			EYKAPARTAR, FAST PROSENT AV NETTO										
	Hýruprosent	manningar -partar	Ein mann-ingarpartur	Skipari	1. Stýrimaður	2. Stýrimaður	1. Meistari	2. Meistari	3. Meistari	kokkur	Dekkari	Samlað útgjald	Frítíðarløn	lønarútgjalding ialt av netto
> enn 1.500 brt.	**17,50%**	**12**	**1,46%**	2,55%	1,18%	0,80%	1,02%	0,55%	0,29%	0,36%	1,46%	24,26%	2,10%	**26,36%**

Talva 10 Hýra hjá uppsjóvarskipum > enn 1500 HK við 12 monnum

Frávik av aktuellum sáttmála

Í teimum førum har frávik eru frá 26,2 % í hýru, so tekur uppskotið hædd fyri hesum. Norðborg er t.d. eitt uppsjóvarskip, men samstundis eisini eitt verksmiðutrolari. Við t.d. 26 monnum er hýrusáttmálin 34,6% - hetta tekur ATU hædd fyri.

Olja

Oljuprísur	5,00	
olja pr. dag í fiskarí	20.000	litur
veiða pr. dag	400.000	kg
veiða pr. túr	1.200.000	kg.
Sigling á fiskileið	3	dagar
Olja pr. dag í sigling	7.000	litur

Talva 11 fortreytir fyri oljuútrokningum

Lán/virði á skipið og eginpeningur

	lán og virði á skipi	250.000.000	kr.	har restvirði, eftir 20 ár,	
	Scrapvirði eftir 20 ár	57.692.308	kr.	er sett til 58 mil. Kr.	
40%	Renta Realurin	5,49%	12 mðr. CIBOR +2,5% stig		5.490.000
60%	Renta banki	5,49%	12 mðr. CIBOR +2,5% stig		8.235.000
	Eginpeningure	50.000.000	20%	Rent ialt	13.725.000

Talva 12 talva fyri lán/virði og eginpeningi

Í øllum útrokningum av ognaraavkastinum er ognin sett til 300 mill. kr. Frymilin fyri útroknan av ognaravkastinum er so:

$$\text{Ognaravkast} = \frac{\text{Úrslit áðrenn rentur x 100}}{\text{Virði á skipinum+eginpeningur}}$$

At virði á skipinum er sett til 250 mill. kr. er tí, at kostnaðurin av tí er tann sami hvørt ár. Um eitt skip verður bygt fyri t.d. 400 mill. kr., so er tað vanliga meira effektivt enn hesar útrokningar eru settar til, t.v.s., at slík skip fara – undir vanligum umstøðum – at veiða meira pr. dag enn veiðan pr. dag er sett til at vera. Tá skipið er goldið niður um 250 mill. kr., so er tað ein fyrimunur hjá hesum skipinum restina av tíðini.

Broyting í øðrum kostnaðum

Aðrar útreiðslur:	
Fiskireiðskapur	
Trygging	
Smyrjiolja + hydr.olja	
Viðlíkahald	
Havnagjald v.m	
Aðrar útreiðslur	
Fyrisiting v. m.	
Ialt	**17.000.000 kr.**

Talva 13 aðrar útreiðslur

Í simuleringunum eru at aðrir kostnaðir settir til 17. mió. kr. (skal eftirmetast). Økjast hesar útreiðslurnar út frá hesum kostnaðum, so skal økingin setast inn í postin "øking í føstum útreiðslum" í útrokningunum (sí s. 13), soleiðis at árið, tá ið skipanin verður sett í verk, blíva fastir kostnaðir frystir fastir.

Avskriving

Grundin til at tað er sett inn her er, at skipini hava hildið virðið sera væl yvir 20 ár. Hinvegin, kemur broyting í, so má ein eisini broyta restvirðið, og harvið verða avskrivingarnar broyttar samsvarandi, serliga um skipini koma at missa handilsvirðið skjótari.